Oljuboringin:

# Framvegis óvissa

OLJULEITING/ANALYSA

*Jan Müller*

Tað hevur eftir øllum at døma gingið nakað seinri enn ætlað hjá BP við tess fyrstu boring í Føroyum. Ætlanin var at røkka endaliga málinum um mánaðarskiftið. Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP sigur, at boringin nú er sett til at verða liðug millum 12. og 15. september tvs. einar tvær vikur longri enn mett varð. Enn resta einir 800-900 metrar í. Ein orsøk til at tað gongur spakuligari nú er tann, at teir eru komnir í rættiliga hart tilfar. Sosialurin skilur, at hetta er ikki beinleiðis basalt. Men tað hevur so við sær, at tað tekur longri tíð at bora. Hjá BP vilja teir ikki gera nakrar viðmerkingar til, at borurin á West Navion nú er farin at bora meira til síðuna, sokallað »sidetracking«. Ymsar orsøkir kunnu verða til hetta. Ein er, at man roynir at sleppa undan tí harða tilfarinum. Ein onnur at man kanska hevur endurskoðað arbeiðsskránna og heldur betri møguleikar liggja við eini nýggjari kós, sum gongur meira til síðuna. Eingin møguleiki er at fáa nakra viðmerking frá Oljumálastýrinum heldur, men tað er ikki óvanligt undir slíkum boringum aðrastaðni, at oljufeløg og myndugleikar semjast um at broyta eitt fastlagt boriprogramm, um hetta verður hildið skilagott og skapar nýggjar møguleikar. Tað er tó ikki møguligt at fáa váttað, um talan er um slíkt í Svínoyarbrunninum.

Tað er annars ógjørligt at fáa nakað at vita um úrslit av boringunum, men at boringin hjá BP nú fer at taka upp til tvær vikur longri enn upprunaliga ætlað, kann merkja, at boringin ikki gongur uttan trupulleikar.

Ætlanin er, at West Navion skal bora ein annan brunn fyri BP og Shell, tá uppgávan á føroyska landgrunninum er liðug. Bretsku megin markið. Eftir øllum at døma kemur tann boringin nakað í drag, nú West Navion skal bora til miðjan september. Eftir tí Sosialurin hevur kunnað funnið fram til, so hevur BP fleiri mál (targets) í síni boring. Eitt høvuðsmál, sum tað kom til fyri eini tíð síðani og síðani í hvussu er eitt mál á gott og væl 4800 metrum.

Hvat boritíðini viðvíkur, so er tað rættiliga ymiskt, hvussu skjótt gongur at bora, tí tað veldst m.a. um, hvussu hart tilfarið er. Gongst væl kanst tú bora einar 20 til 25 metrar um tíman, men gongst illa, kann talan verða um heilt niður í 1-2 metrar um tíman.

Hvat víðvikur boringini hjá Statoil, gongur hon sum ætlað. Rúni Hansen, stjóri er eins fámæltur sum starvsfelagi hansara hjá BP.

Men út frá støðuni í farnu viku kann hetta merkja, at enn eru einir 500 metrar ella so eftir á mál. Rúni Hansen hevur hevur tó onga aðra viðmerking enn hana, at boringin hevur gingið væl, og at teir rokna við at kunna gera støðuna upp tíðliga í næstu viku, sum teir jú alla tíðina hava sagt.

Tað skilst, at eisini Statoil er komið forbí í hvussu er eitt av sínum málum.

Um so var at BP ella Statoil longu høvdu troffið við olju ella gass, so hevði Oljumálastýrið uttan iva longu havt sent tíðindaskriv út. At einki tíðindaskriv enn er komið út um úrslit av leitingini higartil kundi tí bent á – hetta er okkara meting – at hvørki av oljufeløgunum er komið fram á olju ella gass, men at



*West Navion hevur nú borað í góðar fimm vikur*

Oljumálastýrið bíðar við at kunngera nakað, fyrr enn feløgini ella annað av teimum er komið niður til endaliga málið. Og sum støðan sær út í løtuni fer komandi vikuskifti møguliga at vera hæddarpunktið ella endabresturin í Statoilboringini, og kunnu vit tí møguliga vænta tíðindaskriv frá Oljumálastýrinum tíðliga í næstu viku. Tíðindi kunnu tá ganga báðar vegir.

Hin møguleikin er eisini til steðar, nú talan er um »tight hole« status tsv. at einans nøkur fá fólk hava atgongd til upplýsingarnar, at tað hevur borið til at halda so tætt, at einki er likið út um møgulig fund. Tað kenna vit meira enn so aðrastaðni frá. Hetta var m.a. ætlanin við fyrsta fundinum, BP gjørdi við markið í 93, tá tað fann Foinavenfeltið, men har vóru tað so vakin eygu umborð á Smyrli, sum avdúkaðu fundið, tá tey sóu gasslogan frá boripallinum. Tann møguleikin er so eisini enn til steðar í boringini hjá BP hesumegin markið, tí finnur BP nakað, skal tað testa goymsluna. Og tá slepst ikki undan gassloganum.

### Eigur ikki at koma óvart á

Tað eigur neyvan at koma óvart á hvørki oljufeløg ella føroyskar myndugleikar, um hesar fyrstu boringarnar nakrantíð á føroyska landgrunninum ikki enda við lønandi fundum. Vit skulu ikki gloyma, at boraðir vórðu meira enn 150 brunnar vestan fyri Hetland, áðrenn fyrsta lønandi fundið varð gjørt.

Tað, sum hevur gjørt, at oljufeløgini hava verið so bjartskygd, er fyrst og fremst fatan teirra av jarðfrøðini, nevniliga hon at løgini á føroyska landgrunninum líkist teimum bretsku megin markið, har stór fund eru gjørd. Hetta bjartskygni hevur so gjørt, at oljufeløgini hava viljað satsað fleiri hundrað milliónir í boring, tó at tey onga trygd frammanundn hava fyri at raka rætt við fyrstu boring.

Men skuldi tað hent, at eingin olja verður funnin í hesum báðum fyrstu brunnunum, so nýtist tað ikki at merkja, at eingin olja er í føroysku undirgrundini. Hon er nevniliga stór, og oftani er tað at finna olju sum at leita eftir eini knappanál í eini sátu. Við øðrum orðum kann oljan, er hon er, liggja goymd aðrastaðni, t.d. í økinum hjá Amerada Hess ella hvør veit, í lisensinum hjá Agip og Føroya Kolvetni. Ella kanska finst hon undir basaltinum. Er bjartskygnið og vónirnar hjá jarðfrøðingunum, sum eru teir, ið hava tulkað seismisku upplýsingarnar og harvið eisini sett út í kortið, stórt, so er tað eisini ein sannroynd, at óvissan er uppaftur størri.

Heilir 33 brunnar vórðu boraðir í norskum øki, áðrenn fyrsta fundið varð gjørt. Í Føroyum verða tveir teir fyrstu brunnarnir boraðir í hesi løtu. Tí er rætt at sláa kalt vatn í blóðið, til boringarnar eru lidnar. Men so leingi borað verður, livir vónin ….. og ræðslan.

Sosialurin

Lesið Sosialin

-tað loysir seg!



**Bomull Sport - Cotton Soft**

# Barnatroyggja v/mynstri




| Størrelser: | | 2/4 | 4/6 | 8 | 10/12 | år |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** (plaggets mål) | Ca. | 73 | 78 | 83 | 94 | cm |
| **Hel lengde:** | Ca. | 43 | 46 | 52 | 56 | cm |
| **Ermelengde:** | Ca. | 29 | 32 | 36 | 40 | cm |

**MATERIALER: Bomull Sport eller Cotton Soft (100% bomull), nøster à 50 g.**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| blått nr. 344 eller naturhvitt nr. 300 = bunnfargen | ca. | 5 | 6 | 7 | 7 | nøster |
| naturhvitt nr. 300 eller blått nr. 344 = mønsterfarge 1 | ca. | 3 | 3 | 4 | 4 | nøster |
| beige nr. 368 = mønsterfarge 2 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |

**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3½ eller 4.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram, bunnf=bunnfarge.

**Strikkefasthet:** 23 m glattstrikk og mønster i bredden og 27 omg i høyden på p nr. 3½ eller 4 måler 10 x 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

### Bolen

Legg opp 150-160-170-190 m med bunnfargen på rundp nr. 2½ og str 4-4-5-5 cm rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr. Skift til rundp nr. 3½ eller 4 og glattstr. Str 2 omg med bunnfargen hvor det på 1. omg økes jevnt fordelt til 168-180-192-216 m. Str videre mønster etter diagrammet resten av arb opp. Str til arb måler 38-41-47-51 cm og fell av de midterste 16-18-20-22 m på forstykket til halsringningen omgangstråden er i den ene siden). Str videre frem og tilbake og p beg nå i den ene siden av halsen. Fell videre på hver 2. p mot halsen med 3,2,1,1 m (likt for alle størrelser). Str til arb måler ca. 43-46-52-56 cm (slutt med et helt rutemønster og str resten med bunnfargen). Fell de resterende m rett av.

### Ermene

Legg opp 38-40-42-44 m med bunnfargen på strømpep nr. 2½ og str vr-bord som på bolen. Skift til strømpep nr. 3½ eller 4 og glattstr. Str 2 omg med bunnfargen hvor det på 1. omg økes jevnt fordelt til 50-52-54-58 m. Str mønster etter diagrammet. Tell ut fra midten på ermet slik at mønsteret blir likt til hver side fra midten. Øk samtidig 2 m midt under ermet ved omg beg på hver 4. omg til det i alt er 84-88-92-98 m i omg. Str de nye m med i mønster etter hvert. Str til ermet måler 29-32-36-40 cm. Slutt med et helt mønster og str eventuelt resten med bunnfargen. Str videre 1 omg vr, 5 omg glattstr. Fell løst av. Str det andre ermet likt.

### Montering og halskant

Merk av til ermehull i hver side tilsvarende vidden øverst på ermene. Sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull på hver side av midtm i sidene og klipp opp mellom sømmene. Sy eller mask sm på skuldrene.

Str eller plukk opp ca. 100-102-104-106 m rundt halsringningen med bunnfargen på p nr. 2½ og str 4 cm rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr. Fell løst av. Brett kanten dobbelt mot vrangen og sy den til med løse sting. Sy i ermene fra retten slik: Fest midten av ermet ut for skuldersømmen og sy skiftevis ett sting i vrangomg øverst på ermet og ett sting i m innenfor maskinsømmen på bolen (følg samme m rundt ermehullet). Sy belegget flatt over sårkanten på vrangen.

*Press ikke arb.*
*Legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*




Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgeta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 48